DAGSINS MEINING

Speglið tykkum í úrslitunum

Tað var ikki rætt, tá vit á hesum stað søgdu, at ráevnini í undirgrundini ikki stóðu í Heimastýrislógini. Málsøkið stendur, sum Høgni Hoydal vísti á, undir b málum. Høgni Hoydal skal hava takk fyri, at hann rættleiðir okkum, og annars ger viðmerkingar til oddagreinir okkara, ið miða eftir at elva til konstruktivt kjak.

Vit standa sjálvsagt við tað, ið annars var skrivað í nevndu oddagrein. At málsøki ikki eru nevnd í heimastýrislógini fer at gerast alsamt vanligari, tí heimurin er nógv broyttur síðani 1948 og fer at broytast enn meir. Umhvørvismál av ymsum slag og fyri ikki at tala um ílegugransking og annað tílíkt, ið fer at stinga seg upp við nýggjari tøkni fara í summum førum at fella uttanfyri.

Tað er væl skilligt, at Tjóðveldisflokkurin er grammur eftir at lata sum um, at ein stór broyting er hend í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar. Kapitulatiónin hjá samgonguni skal síggja út sum ein stórsigur nú uppundir val. Tað stutta av tí langa er, at gongdin seinastu tíðina váttar tað, sum andstøðan allatíðina hevur sagt. Vit koma langt við ordiligum samskifti við danir, heldur enn at dyrka konfrontatiónina, sum tað hevur verið gjørt fyrstu 3 árini av hesum valskeiðnum. Tey 3 árini hava verið spill av tíð, og nú verður alt eftir øllum at døma skundað ígjøgnum til onnur at taka upp.

Undirgrundin er eitt sera gott dømi um hvussu gott politiskt handalag kann føra á mál. Harmiligt er, at tjóðveldisleiðslan fokuserar á alt tað, ið kundi verið ella mundi verið. Tað eru úrslitini, ið telja, og tey kann formaður tjóðveldisfloksins spegla sær í. Tjóðveldisflokkinum má viðganga, at flestu yvirtøkur, ið eru framdar, hava verið framdar undir Javnaðarlogmanni. Eitt søguligt faktum, ið eftir øllum at døma ikki ávirkar núverandi Tjóðveldisleiðsluna í vali av samgongupartnarum.

Tað skal vera okkara vón, at man fer at gevast við at fokusera uppá hvat mundi verið og heldur hyggja at úrslitum og lært av, hvussu tey vóru rokkin.

Í hesum sambandi er tað sera løgið, at eitt blað borðrreiður við gomlum nýggjheitum. Skjøl hava fyrr verið frammi, ið visa, at danskir embætismenn høvdu ymisk uppskot, um hvussu undirgrundarmálið kundi loysast. Tað, ið stendur fast er, at ráevnini í undirgrundini vóru yvirtikin av einum javnaðarlogmanni, og at vit føroyingar fingu tað vit vildu hava, tí at væl var arbeitt. At Tjóðveldismenn so, sum teir einastu í heiminum, ganga og ivast í, at vit eiga tey, er so ein annar spurningur.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

OL-viðurkenning? Politikkur gruggar málið

Bent J. Hansen

Føroyar hava í nógv ár roynt at fáa altjóða viðurkenning innan ítróttina. Hetta hevur eydnast stig fyri stig – fyrst hondbólturin og síðan aðrar ítróttargreinar ein fyri og onnur eftur – alt uttan politiska uppíblandan.

Arbeiðssamir menn/kvinnur hava í fleiri ár arbeitt miðvíst fyri at vinna okkum OL-viðurkenning. Hetta hevur verið drúgt arbeiði, men framburður hevur allatíð verið, og menn hava ongantíð mist vónina. Gjøgnumbrotið kom, tá vit fingu viðurkenning til Paralympic, har vit longu hava vunnið okkara fyrstu heiðursmerki. Alt hetta bar til við røttum ítróttaranda (sum jú eisini er aðalmálið við OL), og uttan politiska uppíblandan.

Undirritaði er vitandi um, at fundur, við luttøku av IOC-limum, er avtalaður at vera í Føroyum til heystar. Hetta er rætta leiðin at ganga, tí OL-viðurkenning er viðurkenning til ítróttarleik leyst av politiskum hugsjónum.

Vónandi hevur áheitan løgmanns á statsministaran ikki skatt málið, og vónandi ávirkar tað ikki okkara núverandi luttøku í Paralympic.

Latið tey, ið arbeiða ítróttini at frama, vinna okkum hesi rættindi, og latið ikki politikkin grugga málið.

Leiguíbúðir hóska seg betri til nútíðar lívsstíl

Elin Lindenskov
valevni Javnaðarfloksins
www.lindenskov.com
elin@lindenskov.com

Stórur mangul er uppá leiguíbúðir og smærri íbúðir, har ikki er neyðugt at verða bangin fyri at verða tveitt út á gøtuna.

Tað er neyðugt, at vit broyta hugburð og koma burtur frá tí vanabundna "at seta føtur undir egið borð". Hetta er ein alt ov stirvin hugsan í einum modernaðum samfelag.

Neyðugt er at koma burtur frá hesari hugsan, ikki bara í Havnini, men um alt landið.

Eini hús kosta yvir eina millión at byggja á bygd. Í Havnini, her sum útboðið av íbúðum og grundstykkjum er alt ov lítið í mun til eftirspurningin, kosta eini hús lættliga um 1,5 millión og meira. Hetta er alt ov nógv hjá einari ungari familju at gjalda.

Eitt slíkt kostnaðarstøði er alt ov vágið fyri familjuna og kann binda hana langt inn í framtíðina.

Hetta kostnaðarstøðið kann ræða ungar familjur í Føroyum frá at seta búgv. Og tað ræðir fólk uttanlands at koma heim aftur. Støk hava slett ongan møguleika við hesum prísstøði.

Tí er tað avgerandi neyðugt at føra ein nýggjan íbúðarpolitik. Ein politik har dentur verður lagdur á møguleikan at fáa sær eina minni íbúð, sum figgjarliga ikki er so bindandi.

Ein slíkur politikur fer at hava við sær, at fleiri fólk fara at tora at flyta út á bygd, somuleiðis sum at tað verður liviligari í Havnini.

Um tað er kommunan, privat feløg, fakfeløg ella pensjónskassar, sum eiga íbúðirnar er ikki so týðningarmikið. Tað týðningarmikla er, at íbúðirnar eru tøkar hjá fólki til rímuligar góðar treytir.

Ítróttarháskúli á Svangaskarði

Súni í Hjøllum
Tjóðveldisflokkurin
Eysturoy

Nývaldi formaðurin í Fótbóltssambandinum segði í sínu fyrstu blaðsamrøðu, at fortreytin fyri eini framhaldandi menning av føroyskum fótbólti er, at føroyingar fáa eina fótbóltshøll innan alt ov langa tíð. Hann nevndi eisini, at tað er sera umráðandi, at hon liggur soleiðis fyri, at so stórur partur av landinum fær gleði av henni. Hann segði, at ein møguleiki er at inniloka grasvøllin á Svangaskarði á Toftum.

Undirritaði heldur, at hetta er eitt sera skilagott uppskot. Um figgingina er at siga, at UEFA letur væl av figgjarligum stuðli til slíkar ætlanir, og tí er als ikki talan um so stóra íløgu fyri Fótbóltssambandið.

Hendan ætlan, sum her er nevnd, gevur eisini heilt aðrar og stórar møguleikar á Svangaskarði.

Fyri nøkrum árum síðan, meðan Signar á Brúnni var landsstýrismaður, arbeiddi hann fyri at seta á stovn ítróttarháskúla á Svangaskarði. Tíverri eydnaðist tað ikki at røkka á mál ta ferðina. Hetta kom m. a. av, at ikki var pláss á figgjarlógini.

Nú er ein gyltur møguleiki hjá landsmyndugleikunum at fáa stovnsett Føroya Ítróttarskúla,

í góðum samstarvi við lokala íróttarfelagið og FSF, fyri ein kostnað, sum ikki er so høgur, tí frammanundan eru so stórar íløgur gjørdar á Svangaskarði.

Tað er einki dulsmál, at tjóðveldisflokkurin ofta hevur gingið á odda, tá ið ungdóminum hevur verið tryggjað útbúgvingar- og fritíðarmøguleikar. Altjóða góðkendi grasvøllurin á Svangaskarði kom, meðan tjóðveldisflokkurin umsat ítróttarmál í landsstýrinum. Vónandi eydnast tað í komandi valskeiði at røkka málinum um at seta á stovn ítróttarháskúla á Svangaskarði.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Fri. kl. 15	Fri. kl. 12	Fri. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Fri. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Viðmerking til Dánjal á Dul Jacobsen

Eyðólv Dimon
Hoyvík

Í Dimmu hósdagin 28. februar hevur Dánjal eina viðmerking til grein mína í Sosialinum, har eg vísti á, at við nýggju fólkaskúlalógini hava lærarar, næmingar, foreldur og skúlastýrir allar møguleikar at ávirka skúlan. Har er bert tann avmarking, at undirvísingin skal vera í tráð við endamálsorðingina í fólkaskúlalógini. Men av tí at játtanin til fólkaskúlan í løtuni er so lítil, so verður skúlin avmarkaður í, hvussu fjølbroyttur hann kann vera, og hetta hevur so aftur tað fylgju, at ávirkanin hjá lærarum, næmingum, foreldrum og skúlastýrum eisini er avmarkað. Hetta kann betrast við at hækka játtanina til Fólkaskúlan. Hin vegin so ávaraði eg ímóti átrúnaðarligum frískúlum, sum fara at virka beint øvugt av endamálsorðingini í fólkaskúlalógini. Hetta fær Dánjal at skýra meg rasist og jødaforfylgjara ??? Dánjal endar viðmerking sína soleiðis "Um nú øll fólk í Føroyum, sum hava størri »áhuga í átrúnaði« enn politikki, venda Javnaðarflokkinum bakið til komandi val, er lítið at ivast í, at synd verður í Javnaðarflokkinum.".

Eftir mínum tykki kunnu vit býta føroyingar í tveir bólkar. Trúgvandi og so hini, sum hava »áhuga« í átrúnaði. Tey fyrru eru í øllum flokkum, men tey seinnu, tey sum skulu brúka átrúnaðin sum amboð fyri at náa einum hvørjum t.d. einum løgtings sessi, einum býráðs sessi o.l. tey hava longu stovnað sín politiska flokk, so har hevur Javnaðarflokkurin onki at missa.

At enda fari eg at vísa á, at tveir svenskir frískúlar við tilknýti til "Livets ord" verða í løtuni kannaðir av svensku myndugleikunum. Skúlarnir fara helst at blíva stongdir. Orsøkin er, at teir byggja alla sína undirvísing á bíbilskar frágreiðingar. M.a. læra teir næmingar sínar, at um fólk gerast sjúk av kreft, tá er hetta ein straffur frá Gudi. Soleiðis kunnu fólk við »áhuga í átrúnaði« brongla kristindóm.

Er løgmaður førur fyri at halda orð?

Finnleif Guttesen
Tvøroyri

Lógaruppskoti um, at pensjónistar skulu fáa skallutar 400 krónur meira um mánaðin, er lagt fram og at pensjónistarnir fáa hesar 400 krónurnar taka vit øll undir við.

Skattalættin hjá samgonguni og um at halda orð.
Politikkurin hjá samgonguni hevur verði og er, at kommunurnar skulu gjalda umleið 50 prosent av øllum skattalætta, uttan at kommunurnar fáa nakran sum helst kunnleika til hesi fyri kommununa álvarsligu figgjarmál.

Tað er lætt hjá samgonguni, at taka æruna fyri givnan skattalætta, tá ið kommunurnar skulu gjalda 50 prosent.

Landstýrismenn høvdu boða frá, at einki uppskot kom frá landstýrinum, sum kommunurnar fóru at hava inntøkumiss av, eftir at figgjarætlaninar hjá kommununum vóru lagdar, men landstýrið heldur ikki orð.

Fíggjarmálaráharrin og hansara møsn.
Trupulleikin hjá løgmanni er at fíggjarmálaráharrin í Útvarp Føroya sigur, at kommununar skulu taka hædd fyri, at landstýrið møguliga fer at geva skattalætta. Trýr fíggjarmálaráharrin, at vit eru tankalesarar. Hvat er hatta fyri nakað møsn at koma við?

Klárar løgmaður at halda orð og verðuleikin
Løgmaður sigur í einari Dag og Viku sending, at Finnleif Guttesen og aðrir kommunal politikarar ikki skuldi stúra fyri hesum skættalætta, tí komunurnar fóru ikki at merkja so nógv til hetta og at tað var ov tekniskt, at greiða frá í sjónvarpinum, hvussu tað bleiv gjørt.

Seinri hevur løgmaður sagt í Útvarp Føroya, at ein møguleiki var, at kommununar ikki blivu traktar fyri FAS- gjald.

Veruleikin er, at FAS gjaldið hjá kommununum er minka við 5,5 mill krónum, men kommununar fáa framvegis eina eyka rokning uppá 14,2 mill krónur frá landsstýrinum.

Landstýrið við løgmanni á odda klára sostatt ikki at halda orð.

Livst, so spyrst.

Áheitan frá Alzheimerfelagnum

Vónandi verða øll tey eldru havd í huga, tá ið farið verður undir at byggja teimum hóskandi bústað

fyri Álzheimerfelagið
Sigrún Mohr

Hesa seinastu tíðina hava vit hoyrt, at fleiri kommunur hava í ætlan at byggja eldraíbúðir, sambýli og ellis- og røktarheim. Hetta er at fegnast um, tí lítil ivi man vera um, at eldrarøktin er ein av mest átroðkandi samfelagsspurningum í løtuni, uttan at onnur ansing ella røkt verða skúgvaðar til viks.

Alzheimerfelagið er ungt felag, ið m.a. hevur sum endamál at stuðla og hjálpa demenssjúkum og avvarðandi teirra. At hesin samfelagsbólkur, sum felagið umboðar, fer at vaksa tey næstu árini, er lítið at ivast í, tí meðallivialdurin veksur, og títtleikin av demenssjúkum økist við aldrinum. Hetta prógva hagtøl úr grannalondum okkara.

At varða av fólki við Alzheimers- ella aðrari demenssjúku er ógvuliga tyngjandi bæði sálarliga og kropsliga. Hetta hevur felagið fleiri dømi um kring landið frá teimum, sum hava átikið sær at ansa sínum næstu, hóast fakfólk staðiliga ávara móti tí, og hóast hetta átti at verið ein samfelagsuppgáva.

Dement fólk krevja serliga røkt, og at fólk hava stundir til tey. Tey broytast spakuliga, og tíverri er tað ofta so, at ilt er at siga, um fólk eru dement ella ei. Næstringar, ið ansa teimum, hava altíð ampa á sær, og svøvnurin verður órógvaður, um nakar svøvnur er. Tungt verður at klára bæði røkt og dagligt verk, og at enda gerast tey røsku sjúk. Hetta er øllum þortum ein óvirðilig loysn.

Alzheimerfelagið ger við hesum vart við støðuna hjá teimum demenssjúku og heitir á politikarar og øll tykkum, ið taka avgerðir, um at hava henda bólk í huga, tá ið ráðleggjast skal. Hugsast skal um, at hesi fólk hava serligan tørv, tá ið tað snýr seg um bústaðarkarmin, og ikki minst, at starvsfókið, sum er um tey, hevur serliga útbúgving. Felagið hevur møguleika til og vil fegið hjálpa og ráðgeva teimum, sum ætla at fara undir hetta stóra og týdningarmikla arbeiði.

Hví biður P/F "Ítróttarvedding" ikki um eitt tilboð frá "Norsk Tipping" ella "Svenska spel"?

Heri Simonsen

Menninir á P/F "Ítróttarvedding" hava verið í ikki sørt ringum skørum seinastu tíðina. Orsøkin er at "móðirfelagið", "Dansk Tipstjeneste" hóttir við at skerja upphæddina ("tipsmidler") ið fer óskerd til ítróttararbeiði, ungdómsarbeiði og mentan. "Dansk Tipstjeneste" tykist ikki til at vera at vika, og er vandi fyri at ÍSF, FUR og LISA verða við skerdan lut komandi árini.

Norðurlendskt samstarv
Men tá um norðurlendskt samstarv ræður, er Danmørkin bert ein av fleiri møguleikum. Tí eigur "Ítróttarvedding" at kanna aðrar norðurlendskar samstarvsmøguleikar innan ítróttarvedding! Íslendska landsfelagið, "Spágrettir" samstarvar við "Svenska spel" um Lotto og Tips-13-veddingina, ið nevnist "Stryktipset" í Svoríki. Tekur tú ein Lotto ella veddingarseðil í Svoríki, kanst tú lesa á baksíðuni: "I samarbete med isländska "Spágrettir"!." Og í Íslandi kanst tú lesa: "I samstarfi með sænsku "Svenska spel"!" Íslendska ítróttarveddingin er soleiðis ein javnbjóðis norðurlendskur samstarvspartnari í samstarvi við "Svenska Spel"! Við felags vinningspulju, sjálvandi.

Norðmenn eru best fyri veddarnar!
"Norsk Tipping" eru teir, ið eru bestir fyri veddarnar (kundarnar). Taka vit donsku (føroysku/grønlendsku) Tips-13 puljuna, eru sjáldan meir enn 5-6 miljónir DKK í puljuni. Í Noreg eru 25-35 miljónir NKK í tipspuljuni, og er tað soleiðis nógv stuttligari fyri veddaran (kundan) at vedda enskan fótbólt í vetrarhálvuni í Noregi, tað gevur væl størri vinningar!

Norska "Oddsen" og svenska "Oddset" eru eisini munandi meira kundavinarlig enn danska "Oddset"! Á "den lange" hjá tí danska "Oddset" ert tú tvungin at vedda útfallið (1, X ella 2) á minst 3 dystum! Í Noregi og Svoríki sleppur tú at vedda útfallið á bara einum dysti, ella tveimum um tú leggur í, og so hava teir eisini betri odds enn danir. Tann gíriga danska veddingartænastan krevur, at tú veddar minst 3 dystir, sum má metast at vera smáligt. Norska Lotto er eisini lagaligari enn danska Lotto. Í Danmark skalt tú raka 7 tøl við verða drigin millum 36 møgulig tøl. Í Noregi skalt tú raka 7 tøl, við verða drigin millum 34 møgulig tøl, also væl lagaligari fyri kundan, enn danska Lotto!

Takið av besta tilboðnum!
P/F "Ítróttarvedding" eigur soleiðis at fara eftir norðurlendska samstarvspartnaranum, ið kann geva "Ítróttarvedding" bestu samstarvsavtaluna, og sum eisini gevur føroysku kundunum bestu tænastuna. "Ítróttarvedding" eigur soleiðis at biðja "Norsk Tipping" og "Svenska Spel" um eitt tilboð! Og taki av besta tilboðnum. Eitt gott og gagnligt norðurlendskt samstarv kann líka væl vera "Norsk Tipping" ella "Svenska Spel", sum "Dansk Tipstjeneste"! Tað sum um ræður er at "Ítróttarvedding" og veddarnir fáa best møguligu samstarvsavtaluna.